# Kanónval var ikki nóg mikið

**Jacob Vestergaard setti næstan í atkvøðutalið hjá fólkaflokkinum í Suðuroy, men tað rann ikki til umboð á tingi**

LØGTINGSVALIÐ 2004
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hann hevði eitt kanónval, men slapp ikki inn á ting kortini.

Enn einaferð má fólkaflokkurin ásanna, at hann er ov stuttur til at fáa tingmann í Suðuroynni.

Men munurin er ikki so stórur, tí nú er hann bara 65 atkvøður frá tjóðveldisflokkinum í stríðnum um tann triðja mannin.

Kortini er høvuðsvalevnið hjá fólkaflokkinum í Suðuroy, Jacob Vestergaard rættiliga vælnøgdur við valið.

Eg hevði ikki væntað, at tað fór at eydnast hesuferðina, tí eg hevði væntað, at tjóðveldisflokkurin fór at halda stand.

Sjálvur fekk Jacob Vestergaard heilar 282 atkvøður og tað er tað mesta nakað valevni hjá fólkaflokkinum í Suðuroy hevur fingið í yvir 50 ár, tí vit skulu heilt aftur til løgtingsvalið í 1950 fyri at finna eina fólkafloksmann í Suðuroy við fleiri atkvøðum. Tað var, tá ið Martin Holm fekk 303 atkvøður.

Tá ið Jacob Vestergaard varð settur í landsstýrið varð tað ein roynd at vinna fólkaflokkinum størri undirtøku í Suðuroynni og tað eydnaðist sostatt, hóast tað ikki var nóg mikið til løgtingsumboð hesuferð, tí flokkurin hevði framgongd upp á 2,3% og so stóra framgongd hwevði ongin annar flokkur í Suðuroy.

– Tað eri eg ómetaliga takksamur fyri og eg haldi, at tað er eitt sera gott úrslit, tá ið hugsað verður um, at eg bara havi verið landsstýrismaður í nakrar mánaðir.

Men Jacob Vestergaard heldur eisini, at hetta vísur, at tað loysir seg hjá fólkaflokkinum at hava landsstýrismann úr Suðuroynni, tí tað gevur sanniliga úrslit.

Tí heldur hann, at hetta er rætta leiðin at ganga.

Og hann dylir heldur ikki fyri, at hann er til dystin fús, skuldi flokkurin einaferð enn heitt á hann um at tikið við einum starvi sum landsstýrismaður.

Hann vil ikki nevna nakrar ávísar samgongumøguleikar, men hann heldur, at møguleikarnir eru nógvir.



*Jacob Vestergaard er sera væl nøgdur, hóast hann ikki varð valdur*

# Tað hevði verið natúrligt at skiparin fór av brúnni

**–Vánaliga úrslitið hjá sambandsflokkinum er als ikki nøktandi og tað hevði ikki verið ónatúrligt, at leiðslan í flokkinum tók støðuna til eftirtektar, sigur Johan Dahl, løgtingsmaður**

LØGTINGSVALIÐ 2004
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg eri heilt avgjørt ikki nøgdur við úrslitið av løgtingsvalinum.

Johan Dahl, løgtingsmaður sigur sambandsflokkurin hevði so vánaligt úrslit á løgtingsvalinum týsdagin, at tað kann als ikki góðtakast.

– Hetta er ein sera álvarslig støða, tí vit høvdu allar møguleikar fyri eini nógv størri undirtøku. Vit høvdu jú sitið í andstøðu og kring alt landið hava nógv fólk lagt eitt ómetaliga stórt arbeiði í valstríðið.

Og hetta má takast upp í flokkinum sum tað álvarsmál tað er, sigur hann.

Tá ið vit spyrja hann, hvat tað var, sum gekk galið, dregur hann eitt sindur á.

Men tað kann ikki skiljast øðrvísi á honum, at hann heldur, at tað er leiðslan í flokkinum, sum hevur svikið.

– Tað hevur als ikki eydnast leiðsluni í flokkinum at fáa boðskap okkara út til fólkið. Tað mugu vit ásanna.

Tá ið vit so spyrja hann um hann krevur, at Lisbeth Petersen skal frá sum formaður, vil hann ikki siga tað.

Men hann sigur, at ein og hvør skipari hevur ábyrgdina av skútuni og gongur tað ikki nóg væl, eigur skiparin at taka avleiðingarnar.

– Soleiðis er tað umborð á skipið og soleiðis er tað á einum og hvørjum virki, at tað er leiðslan, sum hevur ábyrgdina og er úrslitið ikki nóg gott, eigur leiðslan at taka avleiðingarnar.

Og soleiðis eigur tað eisini at vera í politikki. So kann ein og hvør leggja tað í tað, sum tey vilja.

Hann sigur, at tað er ongin ivi um, at eftir eitt slíkt vanlukkuval, má flokkurin endurskoða síni viðurskifti.

## Afturvaldur

Annars er Johan Dahl væl nøgdur við valið í Suðuroynni, har hann varð afturvaldur.

Men eisini í Suðuroynni hevði sambandsflokkurin stóra afturgongd.

Eg hevði væntað nakað av afturgongd, tí framgongdin seinast var so øgiliga stór, so tað var ikki væntandi, at tað fór at standa við. Tó hevði hann vónað, at flokkurin fór at halda støðuna. Tað gekk so ikki, so nú má flokkurin seta øll segl til fyri at vinna hetta innaftur til næsta val, sum vónandi ikki verður, fyrrenn um fýra ár.

Men hann heldur eisini, at tað hevur kostað, at hann hevur verið so nógv norðanfjørð, har hann hjálpt til við at endurreisa Kollafjord Pelagic.

– Men hetta má eg so taka til eftirtektar og gera øðrvísi framyvir, leggur hann afturat.

Annars takkar hann øllum, sum hava hjálpt til í valstríðnum og teimum, sum hava stuðlað flokkinum og honum á valinum.

Sjálvur heldur hann, at ein samgonga ímillum A-B-C hevði hóva honum best, men annars eru fleiri aðrir møguleikar til staðar. Annars heldur Johan Dahl, at vallógin má endurskoðast, tí tað kann ikki vera rætt, at tjóðveldisflokkurin skuldi fáa ein tingmann meiri enn sambandsflokkurin, hóast hann fekk færri atkvøður.



*Løgtingsvalið var ein vanlukka fyri sambandsflokkin og tað verður neyðugt at endurskoða viðurskiftini í flokkinum, sigur Johan Dahl, løgtingsmaður*



# Sverri Midjord tikin á bóli

**– Eg hevði ikki væntað at verða valdur, sigur Sverri Midjord. Bjóðar flokkurin honum landsstýrisess, tekur hann ikki av**

LØGTINGSVALIÐ 2003
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta hevði eg ikki væntað.

Nýggi tingmaðurin hjá javnaðarflokkinum í Suðuroynni, Sverri Midjord, varð tikin á bóli av valúrslitinum týskvøldið.

Hann sigur, at hann hevði væntað at verða nummar trý, so at hann fekk ein møguleika at koma á ting, um so var, at flokkurin kom í samgongu.

– At eg skuldi verða valdur beinleiðis, hevði eg ikki væntað, sigur hann, tí hann var ongantíð í sjónvarpinum.

Men Sverri Midjord er tiltikin at reka á val og tað viðgongur hann eisini.

– Eg reki hart og eg gangi hús úr húsi, viðgongur hann.

Hann sigur eisini, at tað hevur altíð víst seg, at tvørafólk hava staðið manniliga saman um hann og tað gjørdu tey so eisini hesuferð.

Sostatt gjørdu tey 70 ára gamla Sverra Midjord til aldursforseta í tinginum. Hann heldur, at javnaðarflokkurin skal leggja stóran dent á fyri at sleppa í samgongu.

– Veljarin hevur givið okkum álitisváttan til at fara í samgongu, og tað álitið skulu vit ikki svíkja. Besta samgonga, hann kundi hugsa sær, var ein stór samgonga ímillum fólkaflokkin, sambandsflokkin og javnaðarflokkin. Men hann heldur eisini, at samgongan sum var ímillum fólkaflokkin, javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin, var ein sera góð samgonga.

Og afturímóti nógvum øðrum, hevur Sverri Midjord ongar trupulleikar av fortíðini hjá Anfinni Kallsberg.

– Tað er eitt mark fyri, hvussu leingi, vit skulu vevja í fortíðini og tað skerst ikki burtur, at norðoyingar góvu honum dygga álitisváttan.

– Hann hevur fingið so dygga álitisváttan, at vit sleppa illa uttanum hann. Men letur tað seg ikki gera hjá honum at vera løgmaður ella landsstýrismaður, hevði eitt hóskandi starv hjá honum verið at verðið løgtingsformaður, tí tað er tignarligasta starv í landinum.

Hann sigur, eisini, at hann hevur ongar ætlanir um at koma í landsstýrið, so bjóðar flokkurin honum sess, tekur hann ikki av.

– Eg vil heldur verða løgtingsmaður, har eg kann arbeiða ímillum vanliga veljaran við teimum málum, sum hava týdning fyri valdømi, og at verða landsstýrismaður er nakað tekniskt fyri meg í mínum aldri, sigur Sverri Midjord.



*Sverri Midjord er tiltikin góður rakstrarmaður í sambandi við væl og tað gav úrslit hesuferð. Her velur hann á valinum týsdagin*

# Spennandi finteljing í Suðurstreymi

**Jógvan Arge, Rói Egholm og Finnur Helmsdal vóru javnir á triðja plássi á tjóðveldislistanum í Suðurstreymi við 197 atkvøðum hvør, og sjálvstýrislistin í Suðurstreymi telur bara tvær atkvøður færri enn sjálvstýrislistin í Eysturoynni. Fínteljingin í Suðurstreymoyar valdømi í morgin kann vera lagnutung fyri ávís valevni**

VAL
*Kristian E. Andersen*
*kristian@sosialurin.fo*

Tey trý valevnini á tjóðveldislistanum í Suðurstreymi, Jógvan Arge, Rói Egholm og Finnur Helmsdal endaðu allir javnir á einum triðja plássi við 197 atkvøðum hvør. Endaliga fínteljingin í Suðurstreymoyar valdømi verður í hølunum hjá Kommunuskipan Føroya í L. Debesargøtu 6 hósdagin kl. 16. Væntað verður, at hon verður liðug á midnátt, upplýsir Janus Isfeldt, formaður í løgtingsins Valnevnd fyri Suðurstreym. Um teir tríggir tjóðveldispolitikkararnir framvegis eru javnir aftaná fínteljingina, verður lutakast teirra millum, um hvør kemur inn á ting sum triði tinglimur Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi.

## Malan kann koma inn

Fínteljingin kann eisini koma at kosta Kára P. Højgaard tingsessin, tí bert tvær atkvøður eru á muni millum sjálvstýrislistan í Eysturoynni og sjálvstýrislistan í Suðurstreymi. Um tað vísir seg aftaná fínteljingina í teimum báðum valdømunum, at Suðurstreymoyar valdømi dró tað longra stráið, verður tað Malan Johansen, toppskorarin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoyar valdømi við 212 atkvøðum, ið kemur sum eykavald inn á ting í staðin fyri Kára P. Højgaard.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa at vita, nær fínteljingin í Eysturoyar valdømi verður, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Fínteljingin og møguliga eitt lutakast kemur at avgera, hvør av hesum kemur inn á ting*

Mynd: Álvur Haraldsen